umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Løgmansskrivstovan
Tinganes
FO-100
Tórshavn

Argir, 13. mai 2025
Málsnr.: 24/28938
Tykkara málsnr.: LM-072/2024
Málsviðgeri: HD, KHJ

Viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni um atlit at náttúru og umhvørvi í sambandi við møguligan tunnil til Skúvoyar

Umhvørvisstovan, Vernd, hevur fingið áheitan frá Løgmansskrivstovuni um at greiða frá atlit at náttúru og umhvørvi í sambandi við møguligan tunnil til Skúvoyar, serliga í mun til Ramsar sáttmálan og økisvernd sambært náttúruverndarlógina.

Innleiðandi skal upplýsast, at Umhvørvisstovan er avvarðandi myndugleiki innan náttúruvernd og umhvørvisárinsmetingar og *kann tí ikki taka støðu til ítøkilig mál*, men bert viðmerkja vegleiðandi og generelt um evni innan atlit at og árin á náttúru og umhvørvi.

Umhvørvisstovan mælir til, at áðrenn støða verður tikin til ein møguligan tunnil til Skúvoyar, má ein ítøkilig og fullfíggjað umhvørvisárinsmeting gerast av *samlaðu verkætlanini*. Fyri at tryggja, at avgerðin verður tikin á einum væl upplýstum grundarlagið, eigur árinmetingin at fevna um tey ítøkiligu alternativini til tunnils- og vegakerv umframt eina meting um, hvørji árin hesi væntandi hava á náttúru og umhvørvi.

Sum framhald frá fundi hin 6. mai 2025, har spurningar vóru settir til, hvørjar møguligar avmarkingar eru galdandi fyri inntriv í náttúruna á Skúvoynni, sum tilnevnt vátlendi av altjóða týdningi sambært Ramsar sáttmálanum, og í sambandi við mál um økisvernd, sum eru í viðgerð sambært náttúruverndarlógini, eru niðanfyri viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni.

Ramsar sáttmálin

Lond, sum hava tikið undir við Ramsar sáttmálanum, binda seg til at tilnevna í minsta lagi eitt Ramsar-øki, at arbeiða fyri at tryggja vernd av vátlendum, og at gagnnýtsla av vátlendum skal gerast á ein burðardyggan hátt. Endamálið við sáttmálanum er eisini at tryggja eina skynsama gagnnýtslu og varðveitslu av náttúruni, og - um neyðugt - seta tiltøk í verk fyri at verja náttúruna. Tiltøk skulu altíð taka atlit at lokalsamfelagnum, eins og øll verandi nýtsla, siðir, veiða og annað virksemi kunnu halda fram, so leingi sum tað ikki er ein hóttan ímóti fugli ella teirra umhvørvi.

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Upprunaliga fevndi Ramsar sáttmálin serliga um verju av vátlendum av altjóða týdningi, serstakliga búøki hjá vatn- og sjófuglum, seinni er sáttmálin eisini farin at fevna um fuglabjørg.

Skúgvoyggin var tilnevnd sum Ramsar-øki í 2012. Skúgvoyggin hevur eitt ríkt fuglalív, serliga eru tað lomviga-, skúgva- og skrápastovnarnir, sum eru millum teir størstu í Føroyum. Onnur fuglasløg á Skúgvoynni, sum hava verið umrødd í sambandi við tilnevningina sum Ramsar-øki, eru lundi, rita, havhestur, drunnhvíti og kjógvi. Harumframt er nógvur heiðafuglur og smáfuglur á oynni.

Tilnevning av einum Ramsar-øki ávirkar ikki serstøku rættindini hjá landinum. Tilnevnd Ramsar-øki kunnu gerast minni ella møguliga strikast, um tað er neyðugt vegna týðandi samfelagsáhugamál. Um vandi er fyri vistfrøðiligum broytingum í økinum, skal hetta fráboðast Ramsar-aðalskrivstovuni, og kann viðkomandi øki verða skrásett á einum almennum lista fyri Ramsar-øki, har vistfrøðiligi standurin verður ella kann væntast at verða ávirkaður (Montreux-listin).

Um størri inntriv skulu gerast í einum Ramsar-øki, ella um ætlanin er at broyta tilnevnda Ramsar-øki, so viðmælir Ramsar aðalskrivstovan, at ein umhvørvisárinsmeting verður gjørd fyri at meta um møgulig árin á náttúruna, serliga fuglalívið, sum er orsøkin til, at Skúvoyggin varð tilnevnd sum Ramsar-øki.

Náttúruverndarlógin

Endamálið við náttúruverndarlógini er at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.

Fyri at verja náttúrumargfeldið í Føroyum, kunnu verndarøki verða skipaði við heimild í náttúruverndarlógini. Eitt verndarøki fær eina ávísa løgfrøðiliga støðu, sum tryggjar serliga virðismikla náttúru fyri eftirtíðina. Verndarøki eru við til at verja djóra- og plantusløg, náttúrusløg og vistskipanir, og kunnu eisini vera týdningarmikil fyri útilív og mentanararv.

Sum staðfest omanfyri hevur Skúvoyggin serligt fuglalív, t.d. eru stórir stovnar av lomviga, havhesti, skrápi og skúgvi í oynni, og sjáldsama nógv av fjallamurru og grágrælingi eigur í oynni. Eftir umrøðu í Ramsar-nevndini fyri Skúvoynna heittu Skúvoyar kommuna og hagastýrini í oynni í 2024 á Umhvørvisstovuna um at taka stig til at verja oynna sambært náttúruverndarlógini. Arbeitt verður við at gera eina verndarætlan fyri Skúvoynna ella partar av oynni, har tað m.a. verður mett um, hvørjir verndarflokkar hóska til verju av náttúruvirðum í økinum. Verndarøkið verður landafrøðiliga avmarkað, so at tað samsvarar við verndarendamálið.

Tað er verndarendamálið við tí einstøku verndarkunngerðini, sum ítøkiligger karmin fyri, hvat virksemi kann vera í verndarøkinum. Hvat ið heilt ítøkiliga kann metast at vera av slíkum slag, at tað kann virka ímóti verndarendamálinum, stendur til landsstýrisfólkið at meta um.

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Sum dømir um inntriv, sum vanliga eru bannaði í øllum sløgum av verndarøkjum, kunnu nevnast gerð av bygningum, støðum og øðrum varandi og fyribils innrættingum, vegagerð, úrtøka, ífylling ella at leggja mold- og grótrúgvur frá sær. Landsstýrisfólkið kann tó, sambært § 29 í náttúruverndarlógini, gera undantak frá eini verndarkunngerð, um tað ikki er ímóti endamálinum við verndini og ikki kann ávirka verndarvirðini nevningarvert, ella um trygdarfyrilit ella fyrilit fyri týðandi samfelagsáhugamálum gera tað neyðugt.

Samanumtøka

Tað er lítil ivi um, at ein verkætlan av hesum slag, óansæð hvar hon er staðsett, fer at hava skaðiliga ávirkan á náttúruna í nærumhvørvinum.

Sum staðfest omanfyri hevur Skúvoyggin serstøk náttúruvirðir, serliga í mun til sjófugl og heiðafugl, og tí er oyggin tilnevnd sum Ramsar-øki, og er eitt verndarmál sambært náttúruverndarlógini er í viðgerð. Í útgangsstøðinum forðar hetta ikki fyri, at ein tunnil kann gerast til ella frá Skúvoynni, men tað er neyðugt, at atlit verða tikin til náttúruvirðini í oynni.

Tá inntriv verða gjørd í náttúruni, er tað neyðugt at fyrihalda seg til og meta um slagið og eyðkenni av møguligum árinum á náttúru og umhvørvi. Herundir nær inntrivið byrjar, longdina og títtleikan av inntrivinum, umframt møguleikan at avmarka og endurbøta árinini av inntrivinum.

Eins og nevnt omanfyri, mælir Umhvørvisstovan til, at ein ítøkilig og fullfíggjað umhvørvisárinsmeting av *samlaðu verkætlanini* verður gjørd, áðrenn støða verður tikin til ein møguligan tunnil til Skúvoyar. Fyri at tryggja, at avgerðin verður tikin á einum væl upplýstum grundarlagið, eigur árinmetingin at fevna um tey ítøkiligu alternativini til tunnils- og vegakerv og meting um, hvørji árin hesi væntandi hava á náttúru og umhvørvi.

Umhvørvisstovan vil fegin svara spurningum og ivamálum. Vinarliga setið tykkum í samband við okkum, um tit hava tørv á fleiri upplýsingum ella nágreiniligum viðmerkingum.

Vinarliga

Sigga Jacobsen

Deildarleiðari, Vernd